

www.oljan.fo

**Jan Müller** 17 - 01 - 2012

# Úr Grønlandi til Falklandsoyggjar

Boripallurin, Leiv Eirikson, sum Cairn Energy hevur brúkt til at bora fleiri av brunnunum í Grønlandi, nærkast nú Falklandsoyggjunum, har hann skal slóða fyri eini komandi oljuævintýri í suðuratlantshavi. Um góða viku kemur risastóru boripallurin Leiv Eirikson til Falklandsoyggjarnar. Hann fór at sigla av leitileiðini vestan fyri Grønland fyri nøkrum mánaðum síðani við kós móti syðra partinum av Atlantshavinum, har hann eftir ætlan skal bora nakrar brunnar. Meðan boringin í Grønlandi ikki gjørdist tað oljufelagið Cairn hevði vónað, so sær betur út við Falkalandsoyggjarnar, har pallurin skjótt setir borin í. Har eru nevniliga gjørd fleiri oljufund og nú verður so roynt at finna fram til støddina og útvega pening til víðari arbeiðið. Hóast oyggjarnar eru fjarskotnar og hóast Argentina enn ger krav uppá tær, so eru oljufeløg áhugað í at gera íløgur í eina framtíðar oljuvinnu har um leiðir. Nú skal so Leiv Eirikson eftir ætlanini slóða fyri hesum.